Spurnakanning um skíggjanýtslu

Heilsustýrið

1 Vegleiðing til lærarar

- Kunna næmingarnar um kanningina og vinningin á **kr. 3000**, ið lut verður trekt um, eftir **20. novembur**.
- Vís næmingunum **filmsbrotið**.
- Send **leinkið til spurnablaðið** til felags samskiftismiðil.
- Vís næmingum, ið ikki tosa føroyskt, á **ensku útgávuna** við at trýsta á **globus** ovast á spurnablaðnum.
- Lat allar næmingar vita, at tey verða sitandi á teirra plássi í **30 min.** ella til øll eru liðug at svara.

2 Um næmingum tørvar hjálp

Um ein næmingur hevur tørv á hjálp til at svara spurnablaðnum, kunnu tit hjálpa við at:

- Lesa spurningin upp fyri næminginum.
- Greiða frá orðum ella hugtøkum, sum næmingurin ikki skilir.
- Hjálpa næminginum at skilja svarmøguleikarnar.

Tað er týdningarmikið, at tú ikki ávirkar, hvat næmingurin svarar. Kom tí ikki við uppskotum til svar ella gev til kennar, hvat tú heldur, at næmingurin eigur at svara.

Endamálið er at tryggja, at næmingurin skilir spurningin og sjálv/ur kann velja tað svarið, sum best lýsir egnu upplivingar og viðurskifti.

3 Lýsing av hugtøkum í kanningini

Sosialir miðlar

- Endamálið er at **skriva við onnur** á netinum.
- **Leggja út** myndir og filmar.
- **Hyggja eftir** tilfari og undirhaldi frá øðrum.

Dømi: Snapchat, TikTok, Instagram, WhatsApp, Facebook, YouTube

Online spøl (gaming)

- Endamálið er at **spæla online spøl**.
- Antin **einsamøll** ella **saman við øðrum**.
- Á teldu, telefon, PlayStation, Xbox o.s.fr.

Dømi: Minecraft, Roblox, Fortnite, FIFA, Counter-Strike, GTA

! Um barnið hevur tørv á at tosa við onkran

- Nakrir spurningar snúgva seg um **persónligar upplivingar og kenslur**.
- Lærarar verða bidnir um at vera **til reiðar at práta** við næmingar, sum møguliga hava tørv á at seta orð á eitthvørt.
- Ella **vísa á ráðgeving**: ein vaksnan, tey hava álit á · heilsufrøðing · **Tú og eg** ráðgevingin hjá **Barnabata**.